## DAGSINS MEINING

# Ein stórur dagur

Tað er langt síðan, at flokksblaðið í Norðurlondum fór í søguna. Gongdin innan alt, sum eitur blaðútgáva, hevur leingi gingið fram ímóti tí politiskt óhefta blaðnum. Orsøkirnar til hesa tilongd eru fleiri, men ein høvðusorsøkin er helst tann, at eitt dagblað er ikki longur besti miðil hjá einum politiskum flokki til tess at røkka tí størsta veljaraskaranum. Flokkar hava í dag heilt aðrar miðlar og heilt aðrar møguleikar at fáa boðskapin fram og hevur hetta so eisini mangan ført til, at flokksbløð hava liðið ein stillan blaðdeyða.

Øll hendan tilgongdin hevur sostatt fleiri orsøkir. Ein týðandi orsøk er, at lesarin vil hava vissu fyri, at tíðindi ikki eru politiskt litað. Nú er objektivur journalistikkur eitt sera breitt hugtak, og ósemjan er mangan stór um hetta. Hinvegin man almenn semja vera um, at tíðindi eiga ikki at vera litað av flokkspolitiskum sjónarmiðum. Tað eru nú nógv ár síðan, at Sosialurin innihaldsliga gjørdist púra óheftur av Javnaðarflokkinum. Nú er blaðið so vorðið formliga óheft av flokkinum við tað, at Javnaðarflokkurinn hevur selt blaðið. Hetta er ein klók og djørv avgerð. Tað er tó ikki óhugsandi, at avgerðin sker javnaðarfólk í hjartað. Kortini er avgerðin klók, um ein vil blaðnum væl, og hetta fara javnaðarfólk at skilja sum frálíður. Royndir úti og heima hava greitt víst, at tað er eitt mark fyri, hvussu langt tú kanst menna eitt flokksblað. Gongdin innan miðlaheimin setir heilt onnur krøv til eitt blað og eitt blaðhús enn bert fyri fimm árum síðan. Skal blaðið ikki bert yvirliva, men styrkjast og mennast og fara inn á nøkur av teimum sporum, sum eyðkenna eitt nútímans miðlahús, so skulu stórar íløgur gerast, so skal nýtt virksemi byrjast og so mugu blað og miðlahús verða eisini formliga vera óheft av politiskum flokki. Hetta tænir bæði flokki og blað best, men hetta mál kann ikki røkkast við flokksblaðsmyndlinum.

Vit, sum nú eru við til at keypa blaðið, kenna sjálvsagt eina sera stóra ábyrgd yvir fyri tí blaðstjórnarligu linju, sum vit sjálv hava hildið í nøkur ár. Henda linja hevur verið púra greið: vit hava hildið eina kós, sum hevur verið sett út frá hóvligum vinstrahallum sjónarmiðum. Ella sagt á annan hátt: hóast vit ikki hava virkað sum Javnaðarflokksins flokksblað, so hava vit í okkara redaktionellu sjónarmiðum verið fyri friði og samhaldsfesti úti sum heima. Vit hava ikki dult okkara atfinningarsomu støðu til eitt nú verandi leiðslu í USA, sum vit eins og nógvir europear halda, leiðir heimin í óføri. Men henda støða hevur ikki og fer ikki í framtíðini at forða okkum í at vera atfinningarsom mótvegis einum og hvørjum føroyskum flokki, eisini Javnaðarflokkinum, um vit halda orsøk vera til tess. Samstundis kunnu vit lova, at allir flokkar skulu fáa eina fair viðgerð í blaðum og rúmd fyri teirra áskoðanum.

Vit loyva okkum annars at tulka søluna sum eina stóra álitisváttan og eina viðurkenning av tí arbeiði mong okkara hava lagt í okkara arbeiðspláss fyri at føra Sosialin fram í fremstu røð í føroyska blaðheiminum. Vit hava funnið ein strategiskan íleggja í Føroya Tele og gevur henda støða samlað sera góðar menningarmøguleikar. Vit kunnu lova seljara, partnara og lesarum okkara, at vit ikki fara at spara okkum, men fara at leggja uppaftur meira orku í at gera blaðið uppaftur betri og at menna arbeiðsplássið til eitt nútímans miðlahús við tí virksemi og teimum tilboðum, sum hoyrir einum slíkum til. Dagurin í dag er ein stórur dagur fyri Sosialin, Javnaðarflokkin, starvsfólkið, Føroya Tele og fyri síðst men ikki minst okkara lesarar, lýsarar og viðskiftafólk annars, sum fara at fáa eitt enn betri blað og nýggjar og betri tænastur á ymsu miðlapallunum. Her vóna vit eisini, at karmur okkara, Miðlahúsið fer at vera innbjóðandi og at geva íblástur til framtíðar virksemi av ymsum slag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Antin – ella

RICHARD DANIELSEN

Sum tað hevur ljóðað, so varð bókin hjá Ólavi Rasmussen, um Kirkegaard væl seld. Eg vil her gera eina viðmerking heilt stutt.

Ólavur Rasmussen kemur til ta niðurstøðu og tað ger ummælarin, Kim Simonsen eisini, at Kirkegaard meinar, at tey, sum siga at tey eru frelst, ella hava funnið sannleikan, eru á skeivari leið.

Um hesir menn skilja Kirkegaard rætt, dugi eg ikki at siga, eg havi ikki lisið Kirkegaard, men eg loyvi mær at ivast, um hann er heilt rætt skiltur.

Í hvussu so er; tey sum hava eina slíka fatan, hava ikki skilt nøkur grundleggjandi ting, eri eg bangin fyri.

Tá vit siga, at vit eru frelst og komin at kenna sannleikan, so er tað misskilt, um vit vera fatað soleiðis, at tað eru vit, sum nú hava funnið útav einum ella øðrum. Nei, hin frelsandi trúgvin er ikki nakað stórt, sum eg havi avrikað. Tí sigur Paulus í Rómbr.: »Tí er tað av trúgv fyri at tað skal vera av náði« Og í 2. Kor. sigur hann: »Eg trúði, tí talaði eg«.

Vit trúgva, tí Harrin sigur tað og hann lýgur ikki. Eg veit, at tað er ikki altíð so skjótt at koma til hesa sannroynd, tað sigi eg av egnum royndum. Men ein góðan dag, ella tíð í mínum lívi gekk tað upp fyri mær, eins og mongum øðrum, sum vitna, at tey eru frelst – eiga ævigt lív, at frelsan er ein gáva. Eg plagi at siga, at tað er um tá ið lærarin lærir barnið. Roknistykkið kann tykjast so torført, men so brádliga – so gongur tað upp fyri barninum: »Á, nú skilji eg tað, nú síggi eg tað, sjálvandi 2+2 er 4.

Nú fer sjálvandi eingin rættsiktaður persónur at siga: »Hov hov hatta mást tú ikki siga, tú mást ikki reypa, tað er ikki sikkurt hóast alt, at 2+2 er 4. Tað sikrasta er at ivast um alt, tá er man lítillátin«.

Nei, Harrin Jesus sjálvur sigur hetta. »Tann, sum sær sonin – t.v.s. skilur frelsuvegin og trýr - hevur ævigt lív«. Sær, skilir júst sum barnið.

Vit hava einki at rósa okkum av, vit trúgva bara einfalt tí, sum Gud sigur í orði sínum.

Um Kirkegaard virkuliga lærdi hatta, sum nevnt varð, so fór hann skeivur.

Í hvussu so er. Við at hugsa og spekulera við okkara lítla viti, kunnu vit skjótt fara vill. Tað er bert hin einfalda trúgvin á orð Guds – sum ikki er skrivað av monnum, men er ein opnbering úr enda í annan – sum ber á mál.

# Tey stóru nú klandrast

Lag: Nánd

Nú klandrast tey stóru um hvat, ið er list,
og hvør, ið skal fáa av køkuni fyrst.
Hvønn annan tey kákstrúka leingi og væl,
í egnari fávitsku liva sæl.

Og Ólavur stendur í Beitinum enn,
og nú er hann illur og gríslar tenn.
Um Róa eg bað til gubba hjá mær,
úr grunninum peningur játtaður varð.

So gávuleys Dagny nú situr í dag,
tí einki tað dugir, hon festir á blað.
Hann Jensen, hann dugir nógv betur enn øll
at skriva um fananskap, devlar og trøll.

Og Kinna er sessast á ovastu rók
at døma um list, tí hon er so klók.
Frits er amatørur, tað vita hann skal,
og tí kann hann ongantíð mála væl.

Og Jústinus roynir at skriva um Kaj,
men Ebba í fimmara svarar nei,
tað er ikki skaldskapur, góðtak nú tað,
far heldur og skriva í onkrum blað.

Og Rói er komin í svárastu neyð,
hann vil ikki skaldunum sýta breyð.
og næstu ferð fáa øll - sum nú er kraft,
so kanska tey halda at enda kjaft.

Klumman hjá Høgna er lítil men góð,
hon sigur tað, ið millum linjurnar stoð.
Og kemur so onkuntíð Klumman í bók,
tá sett verða skald - øll - í skammikrók.

Ein skurvutur skari nú stendur á rað,
og fellur for Róa nú niður á knæ
og bønar og biður: Tú styrkin veit mær,
so skal eg í bløðunum rósa tær.

Nú skaldini royna at finna út,
hvør størstur man vera, men vita ei av,
at tíðin tann nógv besti dómari er,
tí tænir alt klandrið als ongum her

**Óðin Odn**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.